# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tórshavnar Kommuna má læra at samstarva

Seinastu tíðina hava vit sæð stórar kommunalar útbyggingar um alt landið, og tað er sjálvsagt tiltrongt í nógvum førum. Methøgar skattainnntøkur hava gjørt tað møguligt hjá kommunum at gera hesar íløgur.

Vandin kann tó vera, at pengaríkiligheitin ger, at onkrar íløgur verða gjørdar uttan stórvegis umhugsan og uttan stórvegis kvettan til samstarvsmøguleikar. Sum dømi um hetta kann nevnast bingjuhavnsætlanin hjá Tórshavnar Býráð á Oyrareingjum sum umhvørvisliga tykist óforsvarlig og kemur at oyðileggja eina heila bygd, sum borgarar á staðnum eisini hava víst á - fyribils fyri deyvum oyrum. Vit vita frá søguligum royndum við Torshavnar Kommmunu, at havnabygging ikki er sterkasta síðan hjá kommununi, og tí tykist ætlanin um at leggja fleiri 10 túsundtals fermetrar undir asfalt til bingjur innast í einum fjørði, har bygt øki er rundanum, serliga margháttlig.

Nú er ikki vist, at Tórshavnar Kommuna sleppur at gjøgnuføra ætlanina, tí at tað vildi verið sera løgið, um kommunan sleppir undan at gera eina árinskanning sambært nýggju havumhvørvislógini frá 2005. Bara tað, at Kommunan alment sigur seg ætla slíkt, vísir vantandi vilja til at diskutera samstarv við onnur.

Her er tað, at kommunur mugu læra seg at samstarva um íløgur. Sunda kommuna hevur víst áhuga í at samstarva við Tórshavnar Kommunu um farmahavn. Eisini hevur Runavíkar kommuna tøkt øki til bingjur. Alt hetta kann gjøgnførast uttan nakran ampa fyri folk. Allíkavæl trúttar Tórshavnar Kommuna í besta lokalpolitiskan stíl sína ætlan ígjøgnum um bingjuhavn, uttan at geva nøkrum tanka um samstarv við aðrar kommunur gætur, væl vitandi um, at ein tunnilsætlan er, sum kemur at binda Skálafjørðin við havnina.

Hvussu kunnu føroyingar vænta, at kommunur fara at samstarva um umsitingarøki og íløgur, um størsta kommuna í landinum gongur á odda við solo íløgum, sum eingin tørvur er á samfelagsliga?

Hvussu kunnu vit vænta, at kommunalpolitikkur í framtíðini verður meiri ábyrgdarfullur, um man ikki eingongd í størstu kommunu í landinum klárar at halda seg bara so nøkurlunda til stevnuskráir í býráðssamgonguni? Borgarstjórin í Havn mátti, um nakar, havt ein áhuga í at víst, at hann tekur stevnuskránna alvorligt hjá tí flokki, hann sigur seg hoyra til.

Kann man forsvara at leggja landsuppgávur út til kommunur, sum ikki duga at síggja út um egnar bøgarðar? Kann man forsvara at leggja landsuppgávur út til kommunur, sum ikki lurta eftir sínum egnu borgarum?

Vónandi tekur Tórshavnar Kommuna annað skinn um bak, og gongur á odda í kommunalum samstarvi, sum størsta kommuna í landinum og tosar við eitt nú Runavíkar kommunu ella Sunda Kommunu um havnasamstarv, heldur enn at leggja fleiri 10 túsundtals fermetrar undir í asfalti og betong innast í einum fjørði og harvið oyðileggja ein bygd fyri okkara eftirkomarar.

**Sosialurin**

# Guantanamo merkisdagur og uttanlandsnevndin



JOHN JOHANNESSEN
løgtingsmaður
www.john.fo

**Á sjálvum fimm ára merkisdegnum hjá ræðuligu Guantanamo fangaleguni viðger uttanlandsnevnd løgtingsins árligu umbønina frá amerikanska hervaldinum, um at fáa standandi flúgviloyvi til alt slag av hernaðarligari flogferðslu í føroyskum loftrúmi fyri árið 2007. Eitt høvi, har vit eiga at gera greitt, at føroyskt loftrúm ikki eigur at vera liður í loyniligari burturflyting og píning av fólki**

Júst í gjár var fimm ára dagurin fyri, at amerikanska stjórnin flutti fyrstu fangarnar í Guantanamo fangaleguna á Cuba. Hetta høvið hava mannarættindafelagsskapir kring heimin nýtt til at mótmæla ímóti fangaleguni, brotum á Geneve sáttmálan um krígsfangar, ágangi ímóti mannarættindunum og ágangi ímóti fólkarættinum.

Sambært Amnesty International eru 775 fangar hildnir aftur á Guantanamo síðani 2002, og í løtuni sita 430 fangar úr 35 ymiskum londum í fangaleguni uttan ákæru ella dóm. Fangarnir verða illa viðfarnir og beinleiðis píndir.

Evroparáðið, Amnesty International og onnur hava lagt fram prógv fyri, at amerikanska stjórnin hevur líknandi loynilig fongsul eystaru megin Atlantshav og at loyniligur loftvegis fangaflutningur fer fram til hesi fongsul, har fangarnir verða viðfarnir í stríði við altjóða reglur.

**Uttanlandsnevndin uppií**

Hendan sama fimm ára dagin hjá Guantanamo fangaleguni viðger uttanlandsnevnd løgtingsins árligu umbønina frá amerikanska hervaldinum, um at fáa loyvi til at nýta føroyskt loftrúm til alt slag av hernaðarligari flogferðslu í 2007 í sambandi við stríðið í Irak og í sambandi við "War on Terrorism".

Eins og í sambandi við sama mál í fjør er tað mín avgjørda hugsan, at Føroyar í svari sínum eiga at gera vart við, at vit á ongan hátt góðtaka loyniligan flutning av fangum gjøgnum føroyskt loftrúm við pínslu sum endamáli. Harnæst eigur landsstýrið at heita á donsku stjórnina, um at fáa kannað og staðfest, hvørt loftrúmið yvir Føroyum verður brúkt til ólógligan flutning av fangum.

Av tí, at altjóða samfelagið bæði er við í uppbyggingini av Irak og í altjóða stríðnum ímóti yvirgangi, eiga vit kortini ikki at sýta fyri at geva loyvi til hernaðarliga flúgving, ið uppfyllir hesi altjóða endamál. Í 2002 vildi Javnaðarflokkurin ikki geva sítt samtykki orsakað av, at ST ikki hevði góðkent álop á Irak. Í dag er støðan ein onnur, nú talan er um uppafturbygging av Irak, sum altjóða samfelagið er við í. Tískil eiga føroyskir myndugleikar ikki at seta seg ímóti, at flogið verður gjøgnum føroyskt loftrúm fyri at hjálpa irakska fólkinum.

**Mugu brúka Fámjinsskjalið**

Umframt Mannarættindasáttmálan, Geneve sáttmálan, fólkarættin og vanliga virðing fyri mannaættini, so snýr hetta málið seg eisini um virðing fyri politiskum avtalum, ið vit sjálvi hava vunnið okkum. Tann 29. januar 2005 skrivaðu løgmaður og danski uttanríkisráðharrin undir sonevnda Fámjinsskjalið, sum er felagslýsing, ið millum annað fevnir um at víðka luttøku og ávirkan Føroya á uttanríkis- og trygdarpolitisk mál. Í felagslýsingini eru hesi mál lýst soleiðis:

- I forvaltningen af udenrigs- og sikkerhedspolitiske spørgsmål af betydning for Færøerne er det naturligt, at Færøerne medinddrages og har medindflydelse.
- Der er tale om ægte medinddragelse og medindflydelse med sigte på ligeværdighed i alle spørgsmål hvor Danmark og Færøerne i fællesskab er inddraget.

Á fundi við uttanlandsnevndina 30. mars 2005 nágreinaðu danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, og løgmaður avtaluna um "ægte medinddragelse og medindflydelse". Hetta vóru orð, sum skuldu takast í størsta álvara, varð sagt samstundis sum dentur varð lagdur á, at uttanlandsnevndin eisini átti at kenna sína ábyrgd at uppfylla hetta endamál.

Havandi í huga, at loyniligur flutningur av fangum helst fer fram í føroyskum loftrúmi, kenni eg tað sum mína skyldu sum lim í uttanlandsnevndini at taka orðini um "ægte medinddragelse og medindflydelse" í størsta álvara, og tí er mítt tilmæli fylgjandi:

- At løgmaður tekur stig til at krevja eina ítøkiliga frágreiðing um møguligan flutning av fangum í føroyskum loftrúmi.
- At løgmaður í svari sínum til umbønina frá USA sendir ein greiðan politiskan boðskap um, at Føroyar ynskja at virða bæði mannarættindini og fólkarættin, og at vit tískil ikki góðtaka, at føroyskt loftrúm verður nýtt sum liður í ólógligari pínslu av fangum.

Hóast tað eftir øllum at døma ikki er hugur í uttanlandsnevndini at taka heimildir okkara í álvara og viðgera hetta álvarsmál ítøkiliga, er tað mín inniliga vón, at løgmaður kortini ger tað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.